LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 64

Fra: Bjørn Kalsø <blankskalagardur@gmail.com>
Sendt: 23. februar 2024 13:07
Til: VMR-Journal
Emne: Hoyringarskriv til lógaruppskot um burðardygga ferðavinnu

Á Blankskálagarði á Syðradali K., tekur eingin, hvørki ungur ella gamal, undir við lógaruppskotinum um burðardygga ferðavinnu.

Bæði landsjørð og óðalsjørð, og tey lunnindi, ið har til hoyra, eru høvuðsgrundarlagi undir rakstrinum á garðinum.

Vit hava higartil mest fingist við landbúnað, har siðbundið seyðahald hevur verið bulurin.

Seinnu árini, hava vit harumframt tvinnað landbúnaðin og ferðavinnu til eitt slag av landbúnaðarferðavinnu, fyri at betra um raksturin, og at økja um vinnugrundarlagið á garðinum.

Men í okkara eygum merkja ásetingarnar í lógaruppskotinum, sum er sent til hoyringar, at lunnindi verða flutt av bygd í bý, og at ásetingarnar í lógaruppskotinum fara at gera umstøðurnar at reka landbúnað og ferðavinnu á bygd - munandi verri.

Sama siga onnur, sum fáast við landbúnað og ferðavinnu, norðari á Kalsoynni.

Tí mæla vit frá, at uppskotið um burðardygga ferðavinnu verður samtykt!

Víst verður annars til felags hoyringarskriv frá teimum fýra stabundnu nevndunum í Kalsoynni, sum Klaksvíkar Kommuna, vegna nevndirnar, hevur latið UVMR, hoyringarskriv frá Bóndafelagnum, hoyringarskriv frá Óðalsfelagnum og hoyringarskriv frá Útoyggjafelanum.

Omanfyrinevndu hoyringarskriv mæla øll **frá**, at lógaruppskotið um burðadygga ferðavinnu verður borið í Løgtingið og samtykt.

Vegna Blankskálagarð.

Vinarliga

Bjørn Kalsø

Virusfri.www.avast.com